# Barnadiskotek í Havn

Komandi fríggjakvøld klokkan 18.30 verður barnadiskotek í Eysturskúlanum í Havn, sum 9.D skipar fyri. - Vit fara at hava kappingar og stuttlig spøl, eisini selja vit sodavatan og annað gott. Vit hava hetta tiltak, tí vit eru á ferð til Island við flokkinum, har vit fara at gera alt møguligt spennandi, skrivar 9.D í tíðindaskrivi. Kostnaðurin fyri barnadiskotekið er 30 krónur.



# Listaframsýning á Tvøroyri

Í dag klokkan 17 letur upp ein listaframsýning við akvarellum í Gallarí Oyggin á Tvøroyri, sum eru listaverk eftir Hartvig Stenholdt Hansen. Danski listarmaðurin hevur havt hópin av listaframsýningum í millum annað Danmark, Týsklandi og Finlandi. Framsýningin á Tvøroyri er opin fram til sunnudagin 4. maj. Allar dagar uttan mánadag frá klokkan 14 til 18.

*Hartvig Stenholdt Hansen sýnir fram akvarellir sum hetta í Gallarí Oyggin á Tvøroyri frá í dag.*

*Mynd: picasaweb.google.com*




## Bryggjað meira Sct. Brigid

Serliga Sct. Brigid ale, sum Føroya Bjór sendi á marknaðin sum fyrsta av fýra føðingardagsølum, verður nú aftur at fáa.

Ætlandi skuldu serligu føðingardagsølirnar bert bryggjast tí einu ferðina, men góða móttøkan av Sct. Brigid ale hevur nú fingið bryggjaríið í Klaksvík at senda enn eina tapping á marknaðin.

Sct. Brigid Ale er ein írskt inspirerað Ale 4,6% abv. Bryggjað við úrvaldum rávørum, fleiri ymiskum maltsløgum, besta vatni og kryddað við 3 humlusløgum.

Smakkurin er mildur, lætt kryddaður og balanceraður við góðum malt og humlusmakki.

Næsta ølin í røðini er á marknaðinum í løtuni, og nevnist hendan ølin Sct. Brigid IPA. IPA stendur fyri Indian Pale Ale.

Tey bæði sløgini, sum koma afturat í føðingardagsrøðini, koma út í næstum, verður sagt av Føroya Bjór. Talan er um Sct. Brigid Boheme og Sct. Brigid Blond, og umboða hesar ávikavist kl. 1 og kl. 2 í styrki.

**-mørk**

# Orca og Gestir í Bygdarhúsinum á Strondum

**Leygarkvøldið verður konsert við eysturoyarbólkunum Orca og Gestum í biografsalinum í Bygdarhúsinum á Strondum**

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*



*Orca spældi á Kambsdali um vikuskiftið*

*Mynd: Kristfríð Tyril*

Bólkurin Gestir, ið gav fyrstu og væl móttiknu fløgu sína ”Burtur frá toftunum” út fyri tveimum árum síðani, er broyttur eitt sindur síðani teir vóru at hoyra m.a. á G! festivalinum í summar. Teir, ið mynda bólkin leygarkvøldið, eru Ólavur Jákupsson, sang og el-gittar, Torfinnur Jákupsson, el-gittar, Jens L. Thomsen, el-bass og Jógvan Andreas á Brúnni, trummur.

Bólkurin Orca, ið gav út fløguna ”Livandi Oyða” stutt fyri jól, er sermerktur á tann hátt, at ljóðførini, ið nýtt verða, eru øll gjørd úr burturkasti og ymiskum avløgdum lutum, ið funnir vórðu í einum fjósi innan Glyvur fyri eini tveimum árum síðani. Jens L. Thomsen spælir upp á hegnpelabass, Bogi á Lakjuni spælir einstreingjaða slide rørlampu, Ólavur Jákupsson spælir upp á fløskuorgul og syngur, Jógvan Andreas á Brúnni spælir upp á ymsar tunnur úr plasti og jarni, og Kári Sverrisson spælir upp á eina oljutunnuharpu og syngur.

Orca spældi eina væl vitjaða konsert á Kambsdali farna vikuskifti. Konsertin á Strondum leygarkvøldið er liður í fyrireiking til framførslur hjá Gestum og Orca, ið verða í Belgia og aðrastaðni fyrst í mai mánaði.

# 50 ár síðan Tónleikarfelagið

**Tríggjar fløgur við gomlum perlum koma á marknaðin, sum minni um, at 50 ár eru liðin, síðani Tónleikarfelagið varð sett á stovn**

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*



*Á leið 80 løg eru á teimum trimum fløgunum, sum nú verða sendar á marknaðin*

Tónleikarfelagið var stovnað mánakvøldið 14. apríl 1958. Teir, sum møttu til stovnandi aðalfundin, vóru: Jákup (Aggo) K. Mouritsen, Leivur (hjá Fritleifi) Johannesen, Jens Chr. Knudsen, Jóan Petur (hjá Liffu) Gregoriussen, Bjarni (Simme) Arge Jacobsen, Páll Johannesen á Lag og Tórður Debes Joensen (nú Jóansson).

Tónleikarfelagið var eitt ógvuliga virkið felag. Nevnd og limir skipaðu fyri nógvum ymiskum tiltøkum, t.d. dansi, tónleikavenjing, kjaki um tónleik, fyrilestrum og útvarpssendingum. Hesar útvarpssendingar bóru tónar frá felagslimunum út um alt Føroya land, og vóru tær sera væl umtóktar. Útvarp Føroya eigur í dag eini trettan bond frá “Tónleikarfelagnum”, sum er at gleðast um, tí hetta er virðismikið tilfar.

Tónleikarfelagið livdi sítt fríska lív í eini trý ár, og Útvarp Føroya eigur fleiri enn 100 løg, sum Tónleikarfelagið hevur spælt inn á band. Av teimum eru umleið 80 sangir á hesum trimum fløgunum. Sungið verður á føroyskum, øðrum norðurlendskum málum, enskum og týskum. Nakrir av tónleikarunum og sangarum, sum eru á hesi fløgu eru: Nicolina, Eyðbjørn, Áslakkur, Hjørleif, Hermann, Hannis, Hallgrím, Luddi, Jákup Luth, Tórður, Haldane, Jógvan Skaale, Simme og mong onnur. Hesi syngja m.a. kendu sangirnar: “Teir sigla”, “Tann vinurin kæri”, “Sig mær farvæl”, “Lívið”, “Mín fyrsta flamma” “Eg hugsi um teg”, “Hin seinasta vaktin” og mangir aðrir sangir, sum eru sungnir á øðrum norðurlendskum málum, enskum og týskum.

Tað er eingin ivi um, at Tónleikarfelagið hevur flutt mørk innan føroyskan tónleik, bæði hvat ið sjálvum tónleikaslagnum (popptónleiki) viðvíkur og á málsliga økinum. Tey vístu samtíð og eftirtíð, at føroyskt mál er so mikið rúmsátt, at tað væl kann nýtast til popptónleik, og sigast má, at tey harvið vunnu føroyskum máli eitt máløki afturat.

Eitt, sum eyðkennir tónleikin og orðini, er, at hetta eru einfaldir og erligir poppsangir, og man hetta vera ein orsøk til, at so nógvir teirra gjørdist væl umtóktir. Av sonnum kann sigast, at tey í felagnum reistu ein varða í føroyskari tónleikasøgu.

Nú hálv øld er runnin, síðan Tónleikarfelagið var stovnað, verða limir felagsins heiðraðir á henda hátt, tí teir hava givið landsmonnum sínum so nógvar og góðar upplivingar við teirra glaða og livandi tónleiki. Vónandi tekur tjóðin væl ímóti - einaferð enn.

Kringvarp Føroya gevur út, og tað eru Jóannes Jakobsen og Tórður Johannesarson, ið hava samskipað arbeiðið.